# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*Sjálvandi vænta vit, at muslimsk lond styðja Hizbollah og libanska fólkið við vápnum, heilivági og mati. Tað er einfalt ein átrúnaðarlig skylda!*

*Ayatollah Ahmad Jannati*

# Bardagar um sjúkrahús

**Ísraelski herurin tók minst tríggjar Hizbollah-menn í einum álopi á eitt sjúkrahús í Baalbek í nátt**




*Lítil útlit tykjast fyri friði í Libanon*

*Mynd: Retuers*

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelski herurin flutti nógvar hermenn til sjúkrahúsið við tyrlum, og sambært libansku trygdartænastuni vóru harðir bardagar har millum ísraelsku hermenninar og limir í Hizbollah. Ein talskvinna hjá ísraelsku herleiðsluni segði fyrrapartin, at álopið gekk eftir ætlan. Eingin ísraelskur hermaður varð særdur, og tað eydnaðist hermonnunum at taka tríggjar Hizbollah-menn við sær aftur um markið, segði hon.

Keldur hjá Hizbollah søgdu harafturímóri, at teir ísraelsku hermenninir blivu kringsettir, so skjótt teir vóru komnir úr tyrlunum, og at minst fýra ísraelskir hermenn fullu í bardøgunum. Tað avsannar ísraelska herleiðslan.

Libanska trygdartænastan upplýsti seinni, at ísraelsk flogfør høvdu søkt at fleiri støðum hjá Hizbollah einar tveir kilometrar frá sjúkrahúsinum í Baalbek, og at minst 15 fólk vórðu særd. Embætismenn hjá trygdartænastuni søgdu, at Baalbek verður mettur sum ein av høvuðsstøðunum hjá Hizbollah, og at ísraelsmenn helst søktu at býnum, tí teir hildu, at teir burturfluttu hermenninir blivu fjaldir á sjúkrahúsinum. Hizbollah rekur sjúkrahúsið.

Ísraelskar keldur søgdu harafturímóti, at ætlanin var at taka ein av leiðarunum í Hizbollah, Sheikh Mohammed Yazbek, sum sambært ísraelsmonnum var á sjúkrahúsinum í gjár. Sambært CNN arbeiða sýriskir og iranskir læknar á sjúkrahúsinum, og ísraelsku hermenninir kannaðu øll skjól teirra.

### Herða álopini

Ísrael hevði boðað frá, at tað fór at taka loftálopini uppaftur aftan á midnátt í gjárkvøldið. Samstundis samtykti stjórnin at herða álopini á jørðini, og longu í gjárkvøldið fóru nógvir hermenn afturat norður um libanska markið.

Ísraelskir fjølmiðlar vilja vera við, at nú eru umleið 20.000 ísraelskir hermenn í Libanon.

Fleiri túsund libanar tóku til rýmingar, tá ísraelska herleiðslan boðaði frá, at hon fór at herða álopini har suðuri í Libanon. Norðan fyri býin Tyre sóust fólk í túsundatali flýggja norðureftir, samstundis sum onnur komu til býin sunnaneftir.

# Teheran togar í træðrirnar

**Við sínari ávirkan á Hizbollah hevur Iran ein avgerandi leiklut í kreppuni í Libanon, men í altjóða samfelagnum er ikki semja um at lata prestastýrið medvirka til eina loysn. Og aftanfyri spøkir stríðið um iransku kjarnorkuætlaninar**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Øll eru á einum máli um, at Iran er ein partur av trupulleikanum millum Ísrael og Hiabollah, men tann stóri spurningurin tykist vera, um Iran eisini er ein partur av loysnini.

Í Washington er svarið eitt greitt nei. Har er støðan, at kreppan í Libanon kann einans loysast við at byrgja Iran inni. Tí eitt er, at Iran styðjar Hizbollah, men landið roynir samstundis at elva til ótrygg viðurskifti í øllum Miðeystri, halda amerikanararnir.

Franska stjórnin heldur harafturímóti uppá, at tað dugir ikki at byrgja Iran inni, og fleiri serfrøðingar í Miðeystur-viðurskiftum taka undir við fransmonnum. Tá franski uttanríkisráðharrin, Philippe Douste-Blazy, var í Libanon mánadagin, segði hann, at Iran er ein týðandi og virdur samstarvspartur í Miðeystri. Hetta segði hann, eftir at hann hevði hitt iranska uttanríkisráðharran, Manouchehr Mottaki, sum eisini var í Libanon.

Eins og flestu aðrar stjórnir hevur iranska stjórnin kravt vápnahvíld í Libanon beinanvegin, men hon hevur samstundis gjørt greitt, at hon fer ikki at viðurkenna nakra avtalu, sum er til fyrimun fyri Ísrael. Tað samsvarar eisini væl við politikkin hjá forsetanum, Mahmoud Ahmadinejad, sum fleiri ferðir hevur sagt, at Ísrael eigur at verða strikað av heimskortinum.

Ein partur av loysnini, sum higartil hevur verið umrødd, er at taka øll vápnini frá Hizbollah, men tað er ikki serliga sannlíkt, at Iran fer at taka undir við einari tílíkari loysn. Tað shiamuslimska prestastýrið brúkar tann shiamuslimska Hizbollah til at útvega sær ávirkan á tann sunnimuslimska partin av Miðeystri. Sambært vesturlendskum fregnartænastum fær Hizbollah vápn úr Iran, sjálvt um prestastýrið heldur uppá, at talan er bara um politiskan og moralskan stuðul.

### Kjarnorkan

Skal Iran medvirka til at loysa kreppuna í Libanon og góðtaka, at Hizbollah skal lata vápnini frá sær, fer landið at krevja okkurt munagott afturfyri, og her er tað, at stríðið um landsins kjarnorkuætlanir kemur inn í myndina.

USA og ES vilja vera við, at Iran finglast við at útvega sær kjarnorkuvápn, og londini hava saman við ST fleiri ferðir kravt, at arbeiðið verður steðgað alt fyri eitt. Men Iran heldur uppá, at landið ætlar at brúka kjarnorkuna til friðarlig endamál, og at tað tí hevur rættin á sínari síðu.

Nú hevur ST-trygdarráðið so givið iranska stýrinum freist til tann 31. august at gevast við at ríka uran. Annars verða tiltøk sett í verk ímóti landinum. Men enn er einki, sum bendir á, at Teheran ætlar sær at lurta eftir ST, og hinvegin kann tað væl henda, at Iran fer at gera støðuna í Libanin uppaftur verri, verða tiltøkini hjá ST sett í verk.

Helst var tað ein greið ábending um iransku støðuna, tá ayatollah Ahmad Jannati kom við sínari meting av støðuni:

– Sjálvandi vænta vit, at muslimsk lond styðja Hizbollah og libanska fólkið við vápnum, heilivági og mati. Tað er heilt einfalt ein átrúnaðarlig skylda, segði hann í gjár.